# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 23. februar 2023, kl. 17.00

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hava Laila Haldansen og Pauli T. Petersen, boðað frá, at teimum bórust frá at møta á fundinum. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 23. februar og játtaði at møta. 2. tiltakslimur Elsi Christiansen fekk ikki fundarboð vegna seina fráboðan.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av tiltaksliminum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 165**
Sáttmáli um líkvognskoyring
J.nr.: 17152-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. februar 2023 nýtt tilboð frá Seinastu Heilsan á kr. 2.500 fyri nýggjan sáttmála um líkvognskoyring. Galdandi sáttmálin gongur út 1. mars 2023.

Nevndin mælir til at Vestmanna kommuna ger nýggjan 5 ára sáttmála við Seinastu Heilsan, sambært tilboðið.

**Viðv. 165**
Bygdarráðið samtykti einmælt tilmælið frá Fíggjarnevndini.

**Mál 166**
Eykajáttan til byggibúning
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. februar 2023 mál um grundøkir í Vestmanna Kommunu.

Vegna bíðilista til grundøkir í Vestmanna Kommunu mælir Fíggjarnevndin til eina eykajáttan á kr. 850.000 til møgulig keyp av fleiri grundøkjum í 2023.

Eykajáttanin verður fíggjað við sølu av jarðarteigum og grundøkjum fyri kr. 850.000.

Nevndin mælir til at samtykkja eykajáttanina við 1. viðgerð.

**Viðv. 166**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð.

**Mál 167**
Umraðfesting av játtan til Staðið
J.nr.: 1800002-5-2021

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. februar 2023 mál um at seta tilboð til 4. – 6. flokk á stovn á Staðnum.

Fyri at byrja tilboðið ynskir ungdómsleiðarin at seta tímalønt starvsfólk við førleikum og/ella áhuga fyri málbólkinum.

Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 200.000 settar av til at skifta vindeygu. Mentanarnevndin mælir til at umraðfesta kr. 75.000 av løgujáttanini til at skifta vindeygu yvir til rakstur, tímalønir.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. februar 2023 mál um umraðfesting av játtan til Staðið. Nevndin samtykti einmælt umraðfestingina.

**Viðv. 167**
Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingina av játtan við 1. viðgerð.

**Mál 168**
Eykajáttan til at tryggja spæliplássið oman fyri skúlan
J.nr.: 400002-2-2020

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. februar 2023 mál um at tryggja spæliplássið oman fyri skúlan. Í 2021 samtykti Bygdarráðið tilboðið frá Arta (fyrr Prull) á kr. 386.000 á fíggjarætlanini fyri 2022.

1. partur av arbeiðinum á kr. 128.700 varð goldin í 2022 fyri tilfarið, men arbeiðið bleiv ikki liðugt og Bygdarráðið hevði ikki møguleika at viðgera málið til fíggjarætlanina fyri 2023.

Fyri at fáa arbeiðið liðugt hevur Arta givið kommununi nýtt tilboð á kr. 116.700 u/mvg dagfest 13. februar 2023.

Mentanarnevndin samtykti einmælt at heita á fíggjarnevndina um eina eykajáttan til arbeiðið.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. februar áheitanina frá Mentunarnevndini um at finna pening til eykajáttan.

Laila Haldansen skeyt upp at eykajáttanin á kr. 116.700 u/mvg verður fíggjað av yvirskotinum á fíggjarætlanini 2023.

Nevndin samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð.

**Viðv. 168**
Ingi Olsen skeyt upp at beina málið aftur í nevnd og heita á nevndina um at finna peningin innanfyri egna játtan.

Bygdarráðið samtykti einmælt uppskotið hjá Inga Olsen

**Mál 169**
Umskipan av elsta partinum av gamla kirkjugarði
J.nr.: 431002-4-2022

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi tann 24. august 2022 mál um møguliga umbygging av kirkjugarðinum við kirkjuna. Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt at arbeiðast skuldi víðari við uppskotinum hjá EYA arkitektum um at umbyggja kirkjugarðin við kirkjuna.

Næsta stig í prosjektinum varð at gera forarbeiði, forkanningar, neyvari skrásetingar, upptekningar og annað, sum krevst fyri at fáa eitt grundarlag fyri at kunna seta ávísa upphædd av á fíggjarætlanini fyri 2023.

Forkanningarnar vístu á nakrar møguligar avbjóðingar við drenlag og frárensli og møguleikan fyri at tvey verða jarðað í somu grøv. Trivnaðar- og Umhvørvisnevndin heitti tí á Verkfo um ráðgeving.

Á fundi hjá Trivnaðar og Umhvørvisnevndin tann 17. februar 2023 um avbjóðingarnar, samtykti nevndin at mæla til at útseta umskipanina av elsta partinum av gamla kirkjugarði vegna stóra óvissu, sum kann hava avleiðingar á tíðarfreistina.

**Viðv. 169**
Tilmælið frá Trivnaðar- og Umhvørvisnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 170**
Útbygging av Kirkjugarðinum á Knúgvum
J.nr.: 431002-2-2023

Trivnaðar og Umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. februar 2023 mál um at fáa útvegað fleiri kirkjugarðspláss.

Vestmanna Kommuna hevur eina ætlan við Kirkjugarðin á Knúgvum og eigur øki til tað. Tilboð frá Verkfo til projekt og útboð er á kr. 250.000.

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum hjá Verkfo.

**Viðv. 170**
Tilmælið frá Trivnaðar- og Umhvørvisnevndini varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:20

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Rógvi | Sára Jógvansdóttir | Eyðun Hansen |
| Anja Haldansen | Ingi Olsen | John Zachariassen |